LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2,
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 12. februar 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/16558-35
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**
um støðu fólkakirkjunnar innan føroysku fyrisitingina og virkisøki umboðsmansins

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin fekk eina klagu um kæruavgerðina hjá Almanna- og mentamálaráðnum í sambandi við setan av nýggjum prósti. Ráðið vísti á, at føroyska fólkakirkjan ikki er partur av almennu fyrisitingini og tí ikki fevnd av eitt nú lógini um Løgtingsins umboðsmann. Umboðsmaðurin helt, at føroyska fólkakirkjan í sambandi við yvirtøkuna fór frá at vera fevnd av donsku almennu fyrisitingini og harvið virkisøkinum hjá Folketingets ombudsmand til at vera fevnd av virkisøkinum hjá Løgtingsins umboðsmanni. Seinni hevur Føroya Løgting tó í sambandi við løgtingsmál frá 2013 og 2023 samtykt lóggávu, hvørs fortreyt er, og hvørs viðmerkingar siga, at føroyska fólkakirkjan ikki er partur av føroysku fyrisitingini hjá landi ella kommunum. Við støði í hesum helt umboðsmaðurin støðu fólkakirkjunnar sum part av almennu fyrisitingini vera so mikið ivasama, at umboðsmaðurin valdi ikki at viðgera klaguna um setanarmálið. Umboðsmaðurin helt samanumtikið, at støða fólkakirkjunnar innan fyrisitingina ikki er nóg greitt ásett í lóggávuni. Ein greið støðutakan um støðu fólkakirkjunnar er avgerandi fyri heimild umboðsmansins, men ikki minni fyri í hvønn mun fólkakirkjan skal fylgja vanligu fyrisitingarrættarligu lógum okkara í sambandi við fyrisitingarligt virksemi. Umboðsmaðurin sendi tí fráboðan um lýti við lóggávuni, sambært § 12 í umboðsmanslógini, til Løgtingið og landsstýriskvinnuna í Almanna- og mentamálum.*

## 2. Klagan

Við skrivi, dagfest 1. juli 2024, fekk umboðsmaðurin klagu um setanartilgongdina at seta nýggjan próst í fólkakirkjuni og kæruavgerð hjá Almanna- og mentamálaráðnum í hesum sambandi.

Klagararnir høvdu kært setanartilgongdina hjá biskupi til Almanna- og mentamáláráðið, sum hevði viðgjørt kæruna. Í avgerð, dagfest 24. januar 2024, hevði ráðið staðfest avgerðina hjá biskupi um ikki at tilmæla kærararnar til starvið sum próstur í fólkakirkjuni. Klagararnir hildu ikki, at kæruviðgerðin hjá ráðnum og úrslitið av henni hevði verið nøktandi, og sendu tí klagu til umboðsmannin.

## 3. Málslýsing

Umboðsmaðurin fekk í sambandi við klaguna til vega frágreiðingar og skjøl frá Almanna- og mentamálaráðnum, eins og klagararnir fingu høvi at gera viðmerkingar til málið.

Eftir gjøgnumgongd av málinum gjørdist umboðsmanninum greitt, at støða mátti takast til heimild umboðmansins yvirfyri fólkakirkjuni, áðrenn støða kundi takast til, hvørja viðgerð sjálv klagan átti at fáa.

Virksemi umboðsmansins fevnir, sambært § 4 í umboðsmanslógini, um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu). Umboðsmanslógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.

Virksemi umboðsmansins verður sostatt avmarkað organisatoriskt til at fevna um stovnar innan fyrisitingina undir heimastýrinum, vanliga nevnd almennu fyrisitingina.

Í hesum áliti verður spurningurin um støðu fólkakirkjunnar í mun til almennu fyrisitingina tí lýstur og umrøddur sum tað fyrsta. Frágreiðingar og viðmerkingar til ítøkiliga setanarmálið verða ikki endurgivnar.

## 4. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 15. juli 2024 varð klagan send Almanna- og mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 6 vikur. Samstundis varð Almanna- og mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 22. august 2024 sendi Almanna- og mentamálaráðið umboðsmanninum viðmerkingar til klaguna, har millum annað stóð:

> "...Í mun til málsførið hjá Almanna- og mentamálaráðnum at viðgera kæruna frá klagarunum í setanarmálinum, verður víst til § 35, stk. 2 í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni og FOB1995.298 (eitt tilmæli varð mett sum ein avgerð í mun til teir umsøkjarar, ið ikki blivu tilmæltir. Sbr. eisini FOB1998.117 og FOB2005.195).
>
> Í hesum sambandi skal nevnast, at § 35, stk. 1 í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni fevnir um setan av biskupi, dómprósti og sóknarprestum, ið krevur luttøku av fólkavaldu kirkjuráðunum, og tí var mett neyðugt at áseta staðiliga, at meginreglurnar, ið galda fyri fyrisitingina, eisini skulu galda fyri virksemið hjá innankirkjuligu kirkjumyndugleikunum, sbr. løgtingsmál 131/2012. Kirkjuráðini luttaka hinvegin ikki, tá ið

ein próstur verður settur sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni. Mett verður mett tí, at frával av nøkrum umsøkjarum til eitt starv sum próstur í fólkakirkjuni er dømi um fyrisitingarligt virksemi hjá biskupi, ið kann kærast til landsstýrisfólkið sambært § 35, stk. 1 í nevndu løgtingslóg, hóast fólkakirkjan sum trúarsamfelag ikki er partur av fyrisitingini, sbr. niðanfyri.

Klagararnir halda ikki, at Almanna- og mentamálaráðið ítøkiliga hevur kannað eftir, um alt fór rætt fram í málinum um at seta nýggjan próst, áðrenn avgerðin varð tikin, og at almenni setanarpolitikkurin ikki er fylgdur.

Til tað fyrra er at siga, at Almanna- og mentamálaráðið hevur ítøkiliga kannað málið nóg væl eftir við at hava biðið um skjøl, viðmerkingar og upplýsingar frá pørtunum og sent skjøl, viðmerkingar og upplýsingar til ummælis, og úrslitið varð avgerðin, dagf. 24. jan. 2024, sum nú klagað verður um.

Til tað seinna er at siga, at klagan byggir á eina misfatan av, at almenni setanarpolitikkurin er galdandi fyri fólkakirkjuna.

<u>Almenni setanarpolitikkurin og fólkakirkjan</u>
Tann 18. mars 2024 bað ..., ... og partsumboð vegna klagararnar, Fíggjarmálaráðið, ið varðar av almenna setanarpolitikkinum, um eina grundgeving fyri, hví prestar í fólkakirkjuni í Føroyum ikki eru fevndir av "Starvsfólkapolitikki landsins", tá ið talan er um vanlig starvs- og setanarviðurskifti hjá prestum. Víst var á, at talan í hesum setanarmáli var um eitt starv til eina fyrisitingarliga uppgávu afturat prestastarvinum, og talan ikki er um eitt kall, har sóknarprestur verður kallaður av kirkjuráðunum.

Fíggjarmálaráðið svaraði klagarunum tann 6. mai 2024:

> ”Fíggjarmálaráðið er av tí fatan, at ”Starvsfólkapolitikkur Landsins” røkkur ikki inn um kirkjugátt, annað enn tá ið starvsfólk verða sett í stiftsumsitingina.
>
> Hetta verður grundað á, at fólkakirkjan er ikki partur av almennu umsitingini.
>
> Víst verður í hesum sambandi á, at løgtingið tók undir við at fylgja tilmælinum hjá Mentamálaráðnum, sum uppskotstillara, at fólkakirkjan er ikki partur av almennu umsitingini, sum er ein treyt fyri at koma inn undir ”Starvsfólkapolitikk Landsins”, sum formælið til politikkin ásetir.
>
> Harnæst skal verða víst á, at hvørki § 19 í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni, ið ásetir mannagongdina, tá ið próstur skal setast, ella viðmerkingar til lógina, áseta nakað um, at setanin av prósti skal verða samsvarandi setanar- og lønarviðurskiftunum hjá alment løntum.
>
> Harafturímóti er ásett í § 34 í somu løgtingslóg, at tá ið talan er um størv hjá stiftsumsitingini, so er tað Stiftsstjórnin, ið setir starvsfólk, og skal henda setanin verða samsvarandi setanar- og lønarviðurskiftunum hjá alment settum, og tá ið próstaembæti ikki verður sett sambært hesi reglu, verður mett, at heimild er ikki at nýta hesa regluna.”

Løgfrøðiliga er tað soleiðis, at fólkakirkjan fyrst og fremst er eitt trúarsamfelag, men hevur serstøðu í mun til hitt almenna. Konstitutionelt er hitt almenna bundið til at skula stuðla fólkakirkjuni, og hendan skylda er endurtikin í § 1, stk. 2 í lógini um fólkakirkjuna í Føroyum, sbr. løgtingslóg nr. 60 frá 07.06.2007, sum broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 1. juni 2023. Hevði fólkakirkjan verið partur av fyrisitingini, hevði landið rikið hana, ikki stuðlað henni.

Fólkakirkjan røkir m. a. ymsar fyrisitingarligar uppgávur fyri hitt almenna, men av tí at hon fyrst og fremst er eitt trúarsamfelag, og tí ikki partur av fyrisitingini, er neyðugt at lóggeva bæði innihaldsliga og skipanarliga øðrvísi, tá ið fólkakirkjuni viðvíkur, enn um talan hevði verið um eitt alment fyrisitingarøki, tí annars hevði lóggávan broytt fólkakirkjuna grundleggjandi.

Uppskotssetarin til løgtingslógina um embæti og størv í fólkakirkjuni (táverandi Mentamálaráðið) skjeyt tí upp at lóggeva soleiðis, at lógin tekur støði í, at fyrisitingarrætturin ikki geldur fyri kirkjuna, meðan ásett verður, at hann geldur í teimum førum, at hetta er viðkomandi, sbr. løgtingsmál 131/2012, bls. 36 og 37.

Um hugt verður at formælinum til almenna setanarpolitikkin, so stendur, at starvsfólkapolitikkur landsstýrisins setur karmar fyri tí høvuðspolitikki, sum er galdandi í almennu fyrisitingini.

Fleiri staðni í kirkjulóggávuni er spurningurin um støðu fólkakirkjurnar í mun til almennu fyrisitingina viðgjørdur. Eitt nú kann vísast til viðgerðina av upprunauppskotinum til løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni, har prinsipiellu viðmerkingarnar frá Lógardeildini í táverandi Innlendismálaráðnum ikki blivu tiknar til eftirtektar av Løgtinginum, har skotið var upp eina grundleggjandi broyting viðvíkjandi bygnaðinum í lógaruppskotinum. Táverandi Mentamálaráðið grundgav av prinsipiellum ávum ímóti viðmerkingunum frá Lógardeildini og mælti – vísandi til serstøðu fólkakirkjunnar – til at halda seg til upprunaliga bygnaðin í lógaruppskotinum hesum viðvíkjandi, sbr. bls. 36-38 í løgtingsmáli 131/2012, og hetta gjørdi Løgtingið við 30 atkvøðum fyri. Lóggevari hevur sostatt ítøkiliga tikið støðu til serstøðu fólkakirkjunnar og fylgjurnar, sum henda eigur at hava fyri kirkjulóggávuna.

Eisini kann vísast á bls. 4 í løgtingsmáli 121/2006 um uppskot til løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum, har tað eitt nú stendur, at fólkakirkjan hvørki er ella eigur at vera ein partur av fyrisitingini annars og skal hava sjálvræði í sama mun sum higartil.

Úr enn nýggjari tíð aftur kann eitt nú vísast til bls. 5 í løgtingsmáli 87/2022, har § 5a varð sett inn í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum, har landsstýrismaðurin eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar kann gera av, at tveir próstar kunnu vera í sama próstadømi. Hendan lógargreinin er heimildargrundarlagið fyri at seta ein próst afturat at røkja nakrar uppgávur, sum sambært lóg skulu liggja hjá prósti (originer kompetansa), sum eisini er tað starvið, ið hetta klagumál snýr seg um. Aðrar uppgávur hjá prósti hvíla á delegatión frá biskupi og kunnu tí afturkallast av biskupi.

Í viðmerkingunum til umsitingarligu avleiðingarnar fyri landið í síðstnevnda lógaruppskoti stendur, at kirkjan er ikki partur av fyrisitingini hjá landi ella kommunum, men røkir fyrisitingarligar uppgávur fyri landsmyndugleikar. Víðari stendur, at próstur er innankirkjuligur eftirlitsmyndugleiki.

Sostatt er lóggávan púrasta greið og í sínámillum samsvari, tá ið viðvíkur støðu fólkakirkjunnar í mun til almennu fyrisitingina. Tá fólkakirkjan ikki er partur av almennu fyrisitingini, so er almenni setanarpolitikkurin heldur ikki galdandi í fólkakirkjuni. Hetta hevur Fíggjarmálaráðið, ið varðar av almenna starvsfólkapolitikkinum, staðfest mótvegis klagarunum so seint sum tann 6. mai í ár.

Løgtingsins umboðsmaður viðmerkti í sambandi við fremri umrødda uppskotið til løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni, at umboðsmaðurin hevði viðgjørt eina møguliga klagu um kirkjuna við størsta varsemi, og bert tá ið talan var um, at tað var heilt

greitt, at grundleggjandi reglur í kirkjulóggávuni ikki vórðu hildnar, sbr. skjal 9 í løgtingsmáli 131/2012. Hetta málið er langt frá at vera eitt dømi um tað...
...

... Ásett er í § 5a í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum, sbr. broytingarlóg nr. 74 frá 1. juni 2023:

> "§ 5a. Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi. Landsstýrismaðurin lutar tá, eftir tilmæli biskups, embætisskyldurnar próstanna millum og ger av, hvør teirra er limur í Próstadømisráðnum."

Í viðmerkingunum til hesa lógargrein stendur í løgtingsmáli 87/2022, bls. 5:

> "Kirkjan er ikki partur av fyrisitingini hjá landi ella kommunum, men røkir fyrisitingarligar uppgávur fyri landsmyndugleikarnar: Kirkjubókin er grundskráin í landinum, og kirkjubókaførandi sóknarprestur er jarðarferðarmyndugleiki og navnamyndugleiki á fyrsta stigi. Harumframt er kirkjubókaførandi sóknarprestur eftirkanningarmyndugleiki í málum um hjúnavígslu, og allir sóknarprestar hava vígslumyndugleika viðvíkjandi teimum gott 80 prosentunum av fólkinum, sum eru limir í fólkakirkjuni. Próstur er innankirkjuligur eftirlitsmyndugleiki, øllum hesum myndugleikauppgávum viðvíkjandi. Kemur eitt próstaembæti afturat, verður størri orka til at avgreiða ivamál og aðrar forðingar, ið javnan taka seg upp."...

...

Niðurstøða
Samanumtikið er at siga, at ásett er fleiri staðni í kirkjulóggávuni, at fólkakirkjan er ikki partur av almennu fyrisitingini, og tí er almenni setanarpolitikkurin hjá landsstýrinum ikki galdandi fyri fólkakirkjuna. Hetta er eisini staðfest av Fíggjarmálaráðnum, ið varðar av almenna setanarpolitikkinum, sbr. skriv frá Fíggjarmálaráðnum til klagararnar, dagf. 6. mai 2024..."

Í sambandi við viðgerðina sendi umboðsmaðurin, tann 19. desember 2024, frágreiðingina frá ráðnum, dagfest 22. august 2024, klagarunum til kunningar og møguligar viðmerkingar.

Tann 16. januar 2024 sendu klagararnir sínar viðmerkingar, har millum annað var ført fram:

> "...Í svari til LUM sigur AMMR, at kæran: *"byggir á eina misfatan av, at almenni setanarpolitikkurin er galdandi fyri fólkakirkjuna."*
>
> Vísandi til § 35, stk. 1, í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni, umframt løgtingsmál 131/2012 staðfestir AMMR, at henda misfatan botnar í muninum á almennari og innankirkjuligari fyrisiting, t.v.s. almenna fyrisiting fólkakirkjunnar liggur hjá avvarðandi landsstýrisfólki, meðan innankirkjuliga fyrisitingin liggur hjá Føroya biskupi.
>
> AMMR viðgongur tó, at fólkakirkjan røkir ymsar fyrisitingarligar uppgávur fyri hitt almenna, men leggur síðan afturat: "*...men av tí at hon fyrst og fremst er eitt trúarsamfelag, og tí ikki partur av fyrisitingini, er neyðugt at lóggeva bæði innihaldsliga og skipanarliga øðrvísi, tá ið fólkakirkjuni viðvíkur, enn um talan hevði verið um eitt alment fyrisitingarøki, tí annars hevði lóggávan broytt fólkakirkjuna grundleggjandi*."
>
> Niðurstøðan hjá AMMR er sostatt, at fólkakirkjan er sum trúarsamfelag ikki partur av fyrisitingini. Hetta kann ikki sigast at vera rætt. Fólkakirkjan tekur sær av nógvum

vanligum borgarligum og fyrisitingarligum uppgávum, øvugt øðrum trúarsamfeløgum. Uppgávurnar hjá prósti snúgva seg í stóran mun um at hava samband við stovnar sum t.d. Landsfólkayvirlitið, Familjufyrisitingina, Landslæknan o.s.fr. Sambært biskupi er uppgávan hjá prósti einamest at taka sær av málum, ið verða framd biskupsins vegna...

At seta ein próst kann tí neyvan roknast sum "innaru viðurskiftini" í fólkakirkjuni.

FMR kemur til somu niðurstøðu, tá tey í svari tann 6. mai 2024, siga frá síni fatan: "*Fíggjarmálaráðið er av tí fatan, at "Starvsfólkapolitikkur Landsins" røkkur ikki inn um kirkjugátt,* ***annað enn tá ið starvsfólk verða sett í stiftsumsitingina***."

Víðari sigur FMR:

> "*Harafturímóti er ásett í § 34 í somu løgtingslóg, at tá ið talan er um størv hjá stiftsumsitingini, so er tað Stiftsstjórnin, ið setir starvsfólk, og skal henda setanin verða* ***samsvarandi setanar- og lønarviðurskiftunum hjá alment settum, og tá ið próstaembæti ikki verður sett sambært hesi reglu, verður mett, at heimild er ikki at nýta hesa regluna."***

..."

Tann 16. januar 2025 vórðu viðmerkingarnar frá klagarunum sendar Almanna- og mentamálaráðnum til kunningar og møguligar viðmerkingar.

Tann 28. januar 2025 sendi Almanna- og mentamálaráðið viðmerkingar til skrivið frá klagarunum, har millum annað varð ført fram:

> "
>
> Vísandi til áheitan frá Løgtingsins umboðsmanni, dagf. 16. jan. 2025, viðmerkingar frá klagarunum, dagf. 13. jan. 2025, og viðmerkingar frá Almanna- og mentamálaráðnum 22. aug. 2024 og skjøl og viðmerkingar í málinum annars um setan av nýggjum prósti í fólkakirkjuni skal fyrst verða sagt frá, at avgerðin, ið er kærd, er fevnd av § 35, stk. 2 í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni, sbr. FOB 1995.298, har staðfest var, at eitt tilmæli er ein avgerð í tann mun, at tað er at meta sum endaligt í mun til kærandi partarnar. Mett verður tí, at frával av nøkrum umsøkjarum í sambandi við eitt lógarásett tilmæli frá biskupi til landsstýrisfólkið um at seta ein próst í fólkakirkjuna er dømi um fyrisitingarligt avgerðarvirksemi hjá biskupi, ið kann kærast til landsstýrisfólkið sambært § 35, stk. 2 í nevndu løgtingslóg. Hóast tað ber til at kæra hesa avgerð til Almanna- og mentamálaráðið, tí tað stendur positivt í lógini, er fólkakirkjan sum trúarsamfelag ikki partur av fyrisitingini, sbr. niðanfyri.
>
> ...
>
> Klagararnir halda ikki, at tað kann sigast at vera rætt, at fólkakirkjan sum trúarsamfelag ikki er partur av fyrisitingini, sum er avgerandi fyri, um almenni starvsfólkapolitikkurin eigur at vera fylgdur. Í hesum sambandi skal Almanna- og mentamálaráðið vísa til skjølini í málinum og serliga tann partin, har Almanna- og mentamálaráðið grundgevur fyri, hví fólkakirkjan ikki er at meta sum partur av fyrisitingini, sbr. eitt nú bls. 74 í løgtingsmáli 131/2012:
>
> > "Kirkjan er ikki sum slík partur av almennu fyrisitingini, og er tí ikki fevnd av fyrisitingarlógini yvirhøvur. Almenna fíggingin av kirkjuni er einans um 20% og er tí ikki so munandi, at landsstýrinum sbrt. § 1, stk. 3 í fyrisitingarlógini er heimilt at áseta, at kirkjan

> skal verða fevnd av fyrisitingarlógini, tó at hon ikki kann roknast til almennu fyrisitingina. Tí er neyðugt at áseta staðiliga, at virksemið er fevnt av ásetingunum í hesum kapitli."

Almanna- og mentamálaráðið legði eisini hesa niðurstøðu til grund, tá lógaruppskotið um embæti og størv í fólkakirkjuni varð evnað til, sbr. løgtingsmál 131/2012. Lógartænastan í táverandi Innlendismálaráðnum mælti í eftirkanningini til, at bygnaðurin í lógaruppskotinum, fyrisitingarrættinum viðvíkjandi, varð vendur um, soleiðis at tey virkisøki, ið ikki skuldu verða fevnd av fyrisitingarrættinum, vórðu nevnd positivt. Sjónarmiðini hjá klagarunum í hesum máli minna nógv um tað, ið táverandi Innlendismálaráðið viðmerkti í lógareftirkanningini, sbr. skjal 7 í løgtingsmáli 131/2012.

Táverandi Mentamálaráðið gjørdi vart við, at tað ikki metir, at fortreytirnar fyri støðu fólkakirkjunnar - serstakliga at fólkakirkjan er partur av almennu fyrisitingini - ið táverandi Innlendismálaráðið grundaði flestu viðmerkingar sínar til lógaruppskotið á - eru rættar. Mentamálaráðið segði seg tí ikki hava í hyggju at taka flestu av viðmerkingunum frá Innlendismálaráðum til eftirtektar - og tað gjørdi Løgtingið heldur ikki, og lógaruppskotið bleiv samtykt av Føroya Løgtingi, soleiðis sum Mentamálaráðið hevði skotið upp, t.e. uttan at viðmerkingarnar frá Innlendismálaráðnum blivu tiknar til eftirtektar fyrisitingarrættinum viðvíkjandi.

Síðani er eingin broyting hend, sum kundi elvt til nakra broytta meting av støðu fólkakirkjunnar í mun til almennu fyrisitingina, uttan at almenni parturin av fíggingini av kirkjuni so líðandi er minkaður úr teimum umleið 20%, og nú í 2025 er ætlaður at vera 13,7% av inntøkum kirkjunnar. Talan er um stuðulsjáttan, ikki rakstrarjáttan, tí landið rekur ikki kirkjuna, sbr. eisini pkt. 12.24.5.01 í løgtingsfíggjarlógini fyri 2025. Landið stuðlar henni, sbr. § 1, stk. 2 í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum.

Verður hugt nærri at seinasta skrivinum frá klagarunum, dagf. 13. jan. 2025, so byggir tað á ta fatan, at fólkakirkjan kortini er partur av almennu fyrisitingini. Hetta er nakað, ið Almanna- og mentamálaráðið - í fleiri umførum - hevur víst aftur og undirbygt við tilvísingum til viðkomandi løgtingsmál, har spurningurin er vorðin viðgjørdur. Tá ið fólkakirkjan ikki er partur av almennu fyrisitingini, hevur hon heldur ikki skyldu til at fylgja almenna starvsfólkapolitikkinum, ið sambært formælinum er galdandi í almennu landsfyrisitingini - uttan so at tað staðiliga er ásett í lóggávuni, sum eitt nú í § 34, stk. 2 í løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni viðv. starvsfólkum í Stiftsstjórnini.

Klagararnir vísa á, at niðurstøðan hjá Almanna- og mentamálaráðnum kann ikki vera røtt, tí fólkakirkjan tekur sær av nógvum vanligum borgarligum og fyrisitingarligum uppgávum, øvugt av øðrum trúarsamfeløgum. Víðari verður sagt, at uppgávurnar hjá prósti snúgva seg í stóran mun um at hava samband við stovnar sum t.d. Landsfólkayvirlitið, Familjufyrisitingina, Landslæknan o.s.fr.

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at til ber at leggja eina slíka treyt inn fyri ein stovn, har tað einans verður lagdur dentur á, hvat stovnurin ger, og hvønn stovnurin samskiftir við, tá ið metast skal um, hvørt stovnurin er fevndur av almennu fyrisitingini ella ikki. Ein slík premiss gongur eisini ímóti grundleggjandi viðurskiftum í teirri lóggávu, ið Føroya Løgting hevur samtykt, og sum serliga blivu viðgjørd í sambandi við løgtingsmál 131/2012.

...

Sostatt kann tað avgerandi ikki vera, hvørjum uppgávum, ið fólkakirkjan tekur sær av, ella

hvønn fólkakirkjan samskiftir við, tá ið tað enntá greitt er tilskilað í 1óggávuni, at fólkakirkjan ikki er partur av fyrisitingini, og landsins fígging er so mikið avmarkað, at tað helst ikki so frægt sum hevði verið heimild til at sett løgtingslóg um fyrsitingarlóg og løgtingslóg um innlitslóg í gildi fyri fólkakirkjuna, sbr. bls. 74 í løgtingsmáli 131/2012.

...”

Tann 29. januar 2025 vórðu viðmerkingarnar frá Almanna- og mentamálaráðnum sendar klagarunum til kunningar, eins og boðað varð frá, at málið var mett nóg mikið upplýst, og at farið var aftur undir endaliga viðgerð. Almanna- og mentamálaráðið varð samstundis kunnað um hetta.

## 5. Lógargrundarlag

5.a Støða føroysku fólkakirkjunnar í almennu fyrisitingini í sambandi við yvirtøkuna

Í sambandi við at fólkakirkjan varð yvirtikin var samtykt løgtingslóg nr. 60 frá 7. juni 2007 um fólkakirkjuna í Føroyum (løgtingsmál nr. 121/2006). Lógin er seinni broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 1. juni 2023 ( løgtingsmál nr. 87/2022).

Í § 6 er ásett, at Føroyar eru eitt biskupsdømi við stiftsstjórn. Stiftsstjórnarlimir verða ásettir, og landsstýrismaðurin skal seta neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini.

Í serligu viðmerkingunum til § 6, stk. 4 viðvíkjandi heimild landsstýrismansins at áseta reglur verður á síðu 18 sagt:

> “Stk. 4. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og hvussu virksemið skal skipast. Fyrisitingarliga virksemið í fólkakirkjuni er eyvitað fevnt av reglunum í fyrisitingarlógini. Tí nýtir stiftsstjórnin reglurnar fyrisitingarlógini, tá hon tekur avgerðir. Tað merkir m.a., at stiftsstjórnin skal hoyra viðkomandi partar, áðrenn ætlaða avgerðin verður tikin, at avgerðin skal vera grundgivin, og at kæruvegleiðing skal fylgja við avgerðini.”

Av almennu viðmerkingunum til løgtingsmál 121/2006, á s. 7-8 undir yvirskriftini “Kirkjuskipanin eftir trúbótina – onnur viðurskifti” verður støðan hjá føroysku kirkjuni lýst á henda hátt:

> “...Til ber at staðfesta, at eisini í fyrisitingarligum høpi hevur føroyska kirkjan, mett í søguligum baksýni, verið sermerkt. Sum longu nevnt, varð kirkjan í Føroyum eftir trúbótina skipað sum próstadømi undir Bergens stifti, fyri síðani at verða løgd til Sælands stift og so aftur í 1922 undir eitt nýstovnað Keypmannahavnar stift.
>
> Í 1963 varð embætið sum varabiskupur í Føroyum skipað. Embætið varabiskupur var frammanundan ókent í norðurlendskum kirkjuhøpi yvirhøvur. Hóast formligi kirkjuligi myndugleiki varabiskups í mun til myndugleika próstsins bert varð øktur við rættinum at víga prestar, og biskupurin yvir Keypmannahavnar stifti framvegis var Føroya biskupur, so var broytingin eitt frambrot fyri sjálvstøðuna hjá kirkjuni í Føroyum. Í verki kom

> varabiskupur at røkja flestu embætisskyldur vegna Keypmannahavnar biskup, umframt tær, sum beinleiðis vórðu lagdar til embætið sum varabiskupur.
>
> Nýggja embætið var ein staðfesting av, at fólkakirkjan í Føroyum veruliga var sermerkt, og at hon var inni í einari tilgongd við øktum sjálvstýri í mun til danskar myndugleikar. Eisini kann sigast, at tað, at donsku myndugleikarnir valdu at skapa eitt heilt nýtt slag av embæti til endamálið, var tekin um, at eisini donsku myndugleikarnir hildu, at henda tilgongd so ella so var neyðug og gagnlig fyri fólkakirkjuna í Føroyum.
>
> Tilgongdin heldur fram við, at Føroyar í 1990 verða skipaðar sum sjálvstøðugt stift við føroyskum biskupsembæti. Hóast donsku kirkjulógirnar, sum við ríkislógartilmæli í 1999 vórðu settar í gildi í Føroyum, kunnu tykjast at hava økt um tilknýtið til danskt kirkjuligt lógarverk, so broytir tað ikki við heildarmyndina, at fólkakirkjan í Føroyum altíð hevur verið sermerkt, og løgfrøðiliga og fyrisitingarliga rættiliga sjálvstøðug í mun til ríkismyndugleikarnar."

Av almennu viðmerkingunum til løgtingsmál 121/2006 er eisini eitt brot um fyrireikingina av yvirtøkuni. Í hesum viðmerkingum stendur millum annað á s. 3 og 4:

> "...Málið við yvirtøkuni er, at fólkakirkjan verður yvirtikin, so hon kann halda fram í verandi bygnaði. Tað vil við øðrum orðum siga, at ætlanin er, at yvirtøkan ikki skal broyta fólkakirkjuna, og lógaruppskotini, ið verða løgd fram, eru gjørd eftir hesum yvirskipaða endamáli. Kortini eru fleiri uppskot um ásetingar, sum í ávísan mun víkja frá galdandi ásetingum og lóggávu í Danmark og tí, sum higartil hevur verið galdandi í Føroyum. Tað er einki løgið, tá ið havt verður í huga, at danskar kirkjulógir oftast hava verið settar í gildi í Føroyum í broyttum líki, í tann mun tær eru lagaðar til eftir serstøku føroysku umstøðunum...
>
> ... Hóast lóggávan er nýggj, er endamálið sostatt at halda fast við hitt gamla, at fólkakirkjan í Føroyum við øðrum orðum skal hava karmar, sum eru sera líkir kirkjuskipanini í dag..."

<u>5.b. Støðan hjá donsku fólkakirkjuni innan fyrisitingina</u>

Sambært donskum løgfrøðiligum lesnaði er danska fólkakirkjan við sínum undirliggjandi myndugleikum ein partur av almennu fyrisitingini og harvið eisini undirløgd teimum galdandi fyrisitingarrættarligu reglunum, sí U2016B.15, De folkekirkelige forvaltningsmyndigheder og deres indbyrdes kompetencemæssige forhold, fhv. Retschef Anders Jørgensen. Eisini hevur fyrrverandi danski umboðsmaðurin, Hans Gammeltoft-Hansen, viðgjørt støðu donsku fólkakirkjunnar í mun til fyrisitingina í greinini Forvaltningsret og kirkeret, s. 523-539 í bókini Poul Andersen, Forvaltningsretten og retsvidenskaben, 2024. Í grein síni vísir Hans Gammeltoft-Hansen á, at tann danska fólkakirkjan er eitt "offentligt forvaltningsvæsen" og samstundis eitt trúarsamfelag.

Sostatt er danska fólkakirkjan fevnd av virkisøkinum hjá Folketingets Ombudsmand saman við restini av almennu donsku fyrisitingini sambært § 7 í lov om Folketingets Ombudsmand.

Í lógini um Folketingets Ombudsmand, er tó í § 9 sett henda serliga grein viðvíkjandi fólkakirkjuni:

> ”Folkekirken er omfattet af ombudsmandens virksomhed bortset fra spørgsmål, der direkte eller indirekte vedrører kirkens lære eller forkyndelse.”

Henda reglan skal, sambært løgfrøðiligum lesnaði og fatan hjá Folketingets Ombudsmand, skiljast einans sum ein avmarking av, hvørji viðurskifti viðvíkjandi fólkakirkjuni Folketingets Ombudsmand eigur at fáast við. Í kommenteraðu umboðsmanslógini Ombudsmandsloven med kommentarer, 3. útg. 2025, s. 88 verður § 9 lýst á henda hátt:

> “Bestemmelsen i § 9 er ikke en regel om inkompetence, men har karakter af en bestemmelse, der begrænser ombudsmandens prøvelse. Den har samme funktion som den begrænsning af ombudsmandens prøvelse, som kendes i sager med politisk indhold, hvor det antages, at ombudsmanden ikke skal undlade at gå ind i sager, blot fordi de også indeholder en politisk substans, men han skal i blandede sager begrænse sin prøvelse til de juridiske elementer i sagen...Tilsvarende skal ombudsmanden ikke undlade at behandle sager, der angår folkekirken, blot fordi de også indeholder elementer, der direkte eller indirekte vedrører kirkens lære eller forkyndelse, men han skal i blandede sager begrænse sin prøvelse, så den ikke omfatter disse elementer...”

Eftir stendur, at danska fólkakirkjan sum ein partur av almennu fyrisitingini er fevnd av vanligu heimildini hjá Folketingets Ombudsmand í § 7 við teirri avmarking sum er ásett í § 9.

<u>5.c. Fyrstu lógirnar í sambandi við yvirtøkuna</u>

Eg havi hugt gjøgnum nakrar av fyrstu lógunum um føroysku fólkakirkjuna, sum samtyktar vóru í sambandi við yvirtøkuna:

- Løgtingsmál nr. 122/2006 Uppskot til løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar, sum var samtykt við Løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar.
- Løgtingsmál 127/2007 Uppskot til løgtingslóg um kirkjuráð og próstadømisráð, sum var samtykt við løgtingslóg nr. 27 frá 19. mai 2008 um kirkjuráð og próstadømisráð.
- Løgtingsmál nr. 128/2007 Lógaruppskot til løgtingslóg um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni, sum var samtykt sum Løgtingslóg nr. 42 frá 26. mai 2008 um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni.

Í løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar er tað, sambært § 12, landsstýrismaðurin sum ásetir kirkjuskattaprosentið eftir tilmæli frá stiftsstjórnini. Í hesum sambandi gevi eg mær far um serligu viðmerkingarnar til § 12, har millum annað stendur:

- “...Landsstýrismaðurin hevur hóast broytta orðalagið eftir vanligum fyrisitingarrættarligum grundreglum skyldu at hoyra stiftsstjórnina, um hann hevur í hyggju ikki at fylgja tilmælinum...”

Í løgtingslóg nr. 27 frá 19. mai 2008 um kirkjuráð og próstadømisráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 2013, gevi eg mær far um serligu viðmerkingarnar til § 1 viðvíkjandi ábyrgd og heimildum hjá kirkjuráðnum:

> "Kirkjuráðið hevur somuleiðis ábyrgd av, at fíggjar- og fyrisitingarviðurskifti hjá kirkjusóknini verða stjórnað samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi lógum fyri økið. Her verður serliga hugsað um roknskaparlóg og fyrisitingarlóg, umframt lógina um fíggjarviðurskifti kirkjunnar."

Samstundis verður tó í viðmerkingunum til bæði § 33 og § 34 um heimildir stiftstjórnarinnar yvirfyri kirkjuráði ella próstadømisráði víst á, at kirkjan ikki er samrunnin partur av miðfyrisitingini.

Í løgtingslóg nr. 42 frá 26. mai 2008 um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni verður støða fólkakirkjunnar lýst á henda hátt í serligu viðmerkingunum í sambandi við kærumøguleika:

> "Til § 2,
> Stk. 4. Biskupur er hægsti kirkjuligi myndugleiki. Av tí at málini sbrt. hesari grein eru um ítøkilig tiltøk í sambandi við innaru kirkjuligu viðurskiftini, verður hildið rættast, at hann hevur endaliga orðið. Vanliga orðingin í slíkum føri hevði verið "Avgerðin hjá biskupi er endalig innan fyrisitingina". Men av tí at kirkjan ikki er samrunnin partur av miðfyrisitingini, verður mett, at tann orðingin hevði verið misvísandi."

Henda orðingin, at "kirkjan ikki er samrunnin partur av miðfyrisitingini" og orsøkin til, at orðingin "endalig innan fyrisitingina" ikki verður nýtt, sæst aftur í viðmerkingunum til §§ 7, 8, 10, 16, 19 og 24 í nevndu lóg.

Samanumtikið er tað mín fatan, at málið við yvirtøkuni og lógaruppskotinum, løgtingsmál 121/2006, var, at fólkakirkjan kundi halda fram í verandi bygnaði, og at yvirtøkan ikki skuldi broyta fólkakirkjuna. Hóast tað í øðrum lógum samtyktar um hesa tíð verður sagt, at fólkakirkjan ikki er samrunnin partur av miðfyrisitingini, haldi eg ikki, at hesar lógir kunnu metast avgerandi at broyta fyrisitingarligu støðu fólkakirkjunnar í sambandi við yvirtøkuna.

5.d. Týdningurin av seinni lóggávu

Almanna- og mentamálaráðið hevur víst á, at Føroya Løgting ítøkiliga hevur tikið støðu til, at kirkjan sum slík ikki er partur av almennu fyrisitingini og tí ikki er fevnd av fyrisitingarlógini yvirhøvur í sambandi við løgtingsmál 131/2012, Uppskot til løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni.

Lógaruppskotið var evnað til við støði í hesi fatan, og av skjølunum ið fylgdu við lógaruppskotinum, sást samskifti millum Almanna- og mentamálaráðið og lógartænastuna í Innlendismálaráðnum. Lógartænastan í Innlendismálaráðnum hevði ta grundleggjandi øðrvísi fatan, at fólkakirkjan var partur av almennu fyrisitingini og mælti til, at lógaruppskotið varð broytt samsvarandi hesi fatan. Hesa fatan vísti Almanna- og mentamálaráðið aftur og mælti tinginum til at samtykkja lógaruppskotið. Føroya Løgting samtykti lógaruppskotið, uttan at tær viðmæltu broytingarnar hjá Innlendismálaráðnum blivu tiknar til eftirtektar.

Vert er her at geva sær far um, at hetta var lóggáva á einum avmarkaðum øki í føroysku fólkakirkjuni, og at tað ikki beinleiðis var skrivað inn í lógina, at fólkakirkjan skuldi broyta støðu innan fyrisitingina.

Við løgtingslóg nr. 74 frá 1. juni 2023, Broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum, samtykti Løgtingið hesa nýggju áseting til løgtingslógina um fólkakirkjuna í Føroyum:

> "§ 5 a. Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi. Landsstýrismaðurin lutar tá, eftir tilmæli biskups, embætisskyldurnar próstanna millum og ger av, hvør teirra er limur í Próstadømisráðnum."

Í viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið verður beinleiðis nevnt undir punkt 2.2 um umsitingarligar avleiðingar av uppskotinum fyri land og kommunur, at kirkjan ikki er partur av fyrisitingini hjá landi ella kommunum, men røkir fyrisitingarligar uppgávur fyri landsmyndugleikarnar.

## 6. Niðurstøða

Henda klaga snýr seg um eina setanartilgongd at seta nýggjan próst í fólkakirkjuni og kæruavgerð hjá Almanna- og mentamálaráðnum í hesum sambandi.

Ein viðgerð av klaguni kann eftir míni meting ikki fara fram uttan at fyrihalda seg til og meta um undirliggjandi setanarmálið. Avgerandi fyri eina viðgerð av klaguni er tí, hvørt umboðsmaðurin metir fólkakirkjuna vera fevnda av virkisøki sínum.

Viðgerð mín av hesum máli avmarkar seg tí fyrst til støðu fólkakirkjunnar í mun til almennu fyrisitingina og harvið eisini, hvørt fólkakirkjan kann metast at vera fevnd av virkisøki umboðsmansins, sambært § 4 í løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.

Sambært § 4 í umboðsmanslógini fevnir virksemi umboðsmansins um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu). Umboðsmanslógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.

Í sambandi við hesa klagu hevur Almanna- og mentamálaráðið víst á sína fatan, at føroyska fólkakirkjan ikki er ein partur av almennu fyrisitingini.

Klagararnir eru ikki samdir í hesi fatan, við tað at teir gera galdandi, at í øllum førum partar av virkseminum hjá fólkakirkjuni eru at meta sum fyrisitingarligt virksemi.

<u>Støða fólkakirkjunnar innan almennu fyrisitingina</u>
Í sambandi við yvirtøkuna sæst av lógaruppskotinum, at málið við yvirtøkuni og lógaruppskotinum var, at fólkakirkjan kundi halda fram í verandi bygnaði, og at yvirtøkan ikki skuldi broyta fólkakirkjuna.

Við støði í gjøgnumgongdini omanfyri, er tað mín greiða fatan, at føroyska fólkakirkjan í sambandi við yvirtøkuna gjørdist partur av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, á sama hátt sum danska fólkakirkjan er undir donsku almennu fyrisitingini.

Fyrstu lógirnar, sum samtyktar vóru um føroysku fólkakirkjuna, síggjast ikki broyta hesa fatan, hóast nevnt verður at "kirkjan ikki er samrunnin partur av miðfyrisitingini". Henda orðing, at kirkjan ikki er samrunnin partur av fyrisitingini er væl í tráð við vanliga løgfrøðiliga fatan um donsku fólkakirkjuna sum eitt "forvaltningsvæsen", sum tó er partur av almennu fyrisitingini.

Seinni lóggáva

Almanna- og mentamálaráðið hevur víst á, at Føroya Løgting ítøkiliga hevur tikið støðu til, at kirkjan sum slík ikki er partur av almennu fyrisitingini og tí ikki er fevnd av fyrisitingarlógini yvirhøvur í sambandi við løgtingsmál 131/2012, Uppskot til løgtingslóg um embæti og størv í fólkakirkjuni.

Eg eri ikki heilt samd í hesi fatan, við tað at hetta lógaruppskotið fyri tað fyrsta viðvíkur einans einum avmarkaðum øki innan fólkakirkjuna, og við tað at Løgtingið ikki beinleiðis í einari lógargrein hevur samtykt at broyta støðu fólkakirkjunnar innan fyrisitingina.

Lógaruppskotið var tó evnað til við støði í tí fatan, at kirkjan sum slík ikki er partur av almennu fyrisitingini, og av skjølunum, ið fylgdu við lógaruppskotinum, sást samskifti millum Almanna- og mentamálaráðið og lógartænastuna í Innlendismálaráðnum um hesi viðurskifti. Lógartænastan í Innlendismálaráðnum hevði ta grundleggjandi øðrvísi fatan, at fólkakirkjan var partur av almennu fyrisitingini og mælti til, at lógaruppskotið varð broytt samsvarandi hesi fatan. Hesa fatan vísti Almanna- og mentamálaráðið aftur og mælti tinginum til at samtykkja lógaruppskotið. Føroya Løgting samtykti lógaruppskotið, uttan at tær viðmæltu broytingarnar hjá Innlendismálaráðnum blivu tiknar til eftirtektar.

Við løgtingslóg nr. 74 frá 1. juni 2023, Broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum, samtykti Løgtingið hesa nýggju áseting til løgtingslógina um fólkakirkjuna í Føroyum:

> "§ 5 a. Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar gera av, at tveir próstar skulu vera í sama próstadømi. Landsstýrismaðurin lutar tá, eftir tilmæli biskups, embætisskyldurnar próstanna millum og ger av, hvør teirra er limur í Próstadømisráðnum."

Tað er henda áseting, sum var heimildin til setanarmálið, sum klagan í hesum máli snýr seg um.

Í viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið verður beinleiðis nevnt undir punkt 2.2 um umsitingarligar avleiðingar av uppskotinum fyri land og kommunur, at kirkjan ikki er partur av fyrisitingini hjá landi ella kommunum, men røkir fyrisitingarligar uppgávur fyri landsmyndugleikarnar.

Eg haldi ikki, at tað kann metast heilt ivaleyst, hvørt Føroya Løgting við at samtykkja løgtingsmál 131/2012 og 87/2022 samstundis hevur samtykt at broyta støðu fólkakirkjunnar innan almennu fyrisitingina.

Samanumtikið

Eg haldi, at ein slík grundleggjandi avgerð viðvíkjandi støðu fólkakirkjunnar, um fólkakirkjan í síni heild verður sett uttanfyri vanligan fyrisitingarrætt, eigur at verða gjørd við týðuligari samtykt av Føroya Løgtingi og ikki einans í lógarviðmerkingum.

Um fólkakirkjan ikki skal metast sum partur av almennu fyrisitingini, er ein fylgja, at hon samstundis verður undantikin teimum grundleggjandi fyrisitingarrættarligu lógunum. Tá haft verður í huga, at fólkakirkjan í stóran mun røkir fyrisitingarligar uppgávur yvir fyri borgarum, verður tí neyðugt, í mun til øll hesi øki, at fyrihalda seg ítøkiliga til einstøku lógirnar og áseta nær og í hvønn mun eitt nú ásetingar úr fyrisitingarlógini og innlitslógini skulu vera galdandi.

Vísandi til tann iva í lóggávuni sum lýstur er omanfyri viðvíkjandi støðu fólkakirkjunnar innan fyrisitingina og harvið eisini ivan um, hvørt fólkakirkjan er fevnd av virkisøki umboðsmansins, fari eg ikki at viðgera klaguna um setanartilgongdina at seta nýggjan próst í fólkakirkjuni og kæruavgerð hjá Almanna- og mentamálaráðnum í hesum sambandi.

Ein greið støðutakan til støðu fólkakirkjunnar innan almennu fyrisitingina er avgerandi fyri heimild umboðsmansins, men ikki minni fyri í hvønn mun fólkakirkjan skal fylgja vanligu fyrisitingarrættarligu lógum okkara í sambandi við fyrisitingarligt virksemi. Eg haldi, at henda ógreiða má metast sum eitt lýti við lóggávuni og fari tí at senda fráboðan sambært § 12 í umboðsmanslógini til Føroya Løgting og landsstýriskvinnuna í Almanna- og mentamálum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður